

Andreas Andreasen



Anker Mortensen



Hansina Iversen

# Ikki næstbest…

At eittarar eru áhugaverdari enn tveyarar er líka vist sum at ósemja og stríð er meira spennandi enn friður. Í øllum førum fekk fyrsta Heystframsýningin í fjør nakað væl betri pláss í fjølmiðlunum enn tann í ár. Vit kunnu beinanvegin staðfesta, at hetta ikki hevur nakað við dygdina at gera, tí framsýningin í ár er minst líka góð sum tann í fjør, kanska betri.

KINNA POULSEN
Listfrøðingur

## Erotisk arabesk

Tólvmannaði listafólkabólkurin er í ár minkaður niður í 11, tí Rannvá Kunoy ikki hevur sæð seg føra fyri at senda nakað verk inn. Tað er spell, bæði fyri okkum og hana. Stóra høllin á Tórshavnar Skipasmiðju tykist tó alt annað enn tómlig; 75 umboðandi verk hjá 11 listafólkum er ivaleysa nóg mikið til at fylla høllina. Endaveggurin í listahøllini er ikki lættur at fáast við, samstundis sum hann er tann veggurin, ið sæst best í framsýningarrúminum. Listafólkini hava í hyggju til næsta ár at seta ein beinan vegg upp soleiðis, at endaveggurin ikki er so ójavnur sum nú. Grundin til, at hann riggar sera væl í ár er upphangingin, har fyrilit er tikið fyri, at veggirnir stinga seg út og inn. Tann arabesk-kenda upphangingin við smáum og stórum myndum hjá Anker Mortensen og Hansinu Olsen, ið bylgjast á vegginum er vøkur og fyrimyndarliga væl hugsað, eisini í mun til ljósið. Hansina Iversen arbeiðir eyðsýniliga fullspeed allatíðina og hóast vit kenna hennara myndamál aftur, gongur ein støðug menning og leitan fyri seg í hennara myndum. Í fjør, var myndaflatin meira kompaktur enn hann plagar, fyltur av bláum og grønum í myndum, sum hóast tær vóru nonfigurativar góvu hugasamband til regnvát landsløg. Í ár hómast aftur meira luft, men tó ikki so nógv av reinum lørifti, sum í eldri myndum hjá Hansinu Iversen. Í staðin er bakgrundin litað av einum tunnum farra av t. d. ljósum gulum, ið spælir saman við tí hálvgjøgnumskygda, himmalbláa litlagnum, sum eisini er bakgrund hjá tí meira kompakta bláa og violetta forminum fremst í myndarúminum. Hansina arbeiðir framvegis við ymsum rúmdum í myndunum, sum hon fær fram bæði við litsamanseting og við at variera mongdina av máling og strokum í teimum ymsu formunum. Formarnir eru enn rundleiddir og defineraðir av nágreiniligum pensilsstrokum, men fleiri av kompositiónunum eru diagonalar. Myndirnar tykjast hervið meira dynamiskar, men dynamikkur er eisini í sjónligu pensilsstrokunum og teimum langleiddu, aktivu formunum, ið nærkast hvørjum øðrum á veg út úr myndini. Og hóast luft og andaligar bláar litir tykjast myndirnar rútmiskar og eins sansaliga erotiskar og blómur Georgiu O´Keeffe.

## Pátrongjandi mystisk tekin

Anker Mortensen gongur skjótt til tey hálvtrýss og allíkavæl er einki, sum týðir uppá, at stavnurin ætlar at binda frið og halda seg til tað, sum hann plagar at mála og sum hann dugir at mála. Tá fólk endiliga fóru at dáma tær hvítu myndirnar, gjørdust tær bláar og tá tær bláu tóku at tekkjast, kom svart og gult og alt møguligt annað meiggj upp í leikin. Skelkurin var tó ikki so stórur hesa ferð av tí, at eg hevði sæð eitt prent, sum Anker nýliga hevur gjørt og sum bendi á, at listamaðurin ætlaði sær nýggjar leiðir; frá eksplosión til implosión so to speak og so tó ikki. Tær smáu myndirnar á framsýningini eru lættar at dáma, men tær tríggjar stóru myndirnar eru alt annað enn brávakrar, ella brágóðar. Tær tykjast í fyrstani eins strævnar og pátrongjandi og tekningar hjá børnum, sum júst eru blivin nóg vaksin til at stýra handalagi og køva huglagi í nóg stóran mun til at kunna tekna meira skipað. Myndirnar innihalda fýra nøkulunda eins formar, sum eru ávikavíst ljósabláir, ljósareyðir, ljósagrønir og gulir, ið eru innrammaðir av svørtum. Formarnir eru settir upp í einum skipaðum mynstri og standa so har og lýsa upp sum tigandi, mystisk tekin í myrkrinum. Eyka dentur verður lagdur á religiøsa árinið við upphangingini við teimum trimum stóru myndunum á einum veggi, sum kundi verið ein stór nonfigurativ altartalva í trimum pørtum. Myndirnar vaksa í týdningi hvørja ferð tú